# Føroya Tele sendir tilvildarligar rokningar

**– Í fleiri førum hevur Føroya Tele brotið egnar viðskiftatreytir, hvat rokningum fyri internetsamband viðvíkur. Føroya Tele hevur sum veitari av fjarskiftistænastum skyldu til, at geva brúkaranum »neyva skuldskriving fyri gjøldum fyri veittar tænastur.«**

INTERNET-ROKNINGAR
*Ingrid Bjarnastein*

Ein internetbrúkari hjá Føroya Tele føldi seg ikki sørt snýttan, tá hann fekk eina internetrokning fyri eitt tíðarskeið har viðkomandi hevði verið uttanlands, og tískil ikki hevði havt nakað samband við internetið hjá Føroya Tele.

Brúkarin setti seg í samband við internetdeildina hjá Føroya Tele og bað um at fáa kannað, hvat hetta snúði seg um. Tað kom skjótt undan kavi, at Føroya Tele kundi ikki vísa á nakrar upplýsingar, sum kundu prógva at internetið hevði verið brúkt hetta tíðarskeiðið.

**Leysar grundgevingar**

Grundgevingin fyri rokningina var, at hetta helst mundi vera avlop frá mánaðanum frammanundan. Hóast hesa heldur leysu grundgeving, fekk viðkomandi ongar ávísingar um, at talan veruliga var um avlop.

Á heimasíðuni hjá Føroya Tele stendur, at teir hava skyldu til a) at veita fjarskiftistænastu á dygdarliga høgum stigi og b) kravið fevnir millum annað um neyva skuldskriving av gjøldum fyri veittar tænastur.

Hetta vil tískil siga, at tá Føroya Tele á internetrokningini ikki viðmerkir, hvat gjaldið er fyri, brýtur egnar viðskiftatænastur. Sum kundi hevur tú rætt til eina og hvørja tíð at krevja frágreiðing uppá tínar rokningar.

Vit hava sett okkum í samband við Føroya Tele. Teir hava ongar viðmerkingar í løtuni, men málið verður kannað.

# Oljutingið hittist aftur

*Fyrstu boringarnar á føroyska landgrunninum verður evnið á fundinum hjá Oljutinginum í Listaskálanum í kvøld*



**Í kvøld skipar Oljutingið fyri fundi í Listaskálanum. Tvey evni verða umrødd á tingfundinum, har allir limir kunnu vera við**

FUNDUR
*Heri á Rógvi*

Í eina tíð nú hevur Oljutingið verið virkið. Oljutingið miðjar ímóti at halda fundir fýra ferðir um árið. Fundirnir hava til endamáls at kunna limirnar í Oljutinginum um ymiskt viðvíkjandi oljuvinnuna. Oljutingið hevur tað enska hjánavnið "Petroleum Association of the Faroe Islands". Hetta sigur kanska meira um, hvat fyri slag av felagi vit tosa um. Felagið hevur nærum 200 hundrað limir, harav eini 80 eru virki ella stovnar. Øll kunnu vera limir í Oljutinginum.

– Vit royna at hava eitt forum, har limirnir verða kunnaðir um ymiskt innan oljuvinnuna í Føroyum, og uppmøtingin er eisini rættiliga góð hvørjaferð, sigur Ingvør Nolsøe, formaður fyri Oljutingið.

Felagið hevur júst fingið eina nýggja nevnd. Í henni sita: Ingvør Nolsøe, sum er formaður, Ben Arabo, Sigmund í Jákupsstovu, Annie á Hædd og Alex Buvik.

**Boring og flúgving**

Evnið á fundinum í kvøld verður – fyrstu oljuboringarnar á føroyska landgrunninum – har dentur serliga verður lagdur á operativu síðuna.

Til at siga eitt sindur um hetta, so hava fyrireikararnir heitt á Ben Arabo, stjóri fyri Amerada Hess Føroyar, og Magna Arge, stjóri fyri Atlantic Airways, at halda hvør sín fyrilestur.

Ben fer at røða um fyrstu boringarnar á føroyska landgrunninum, sæð frá einum operatør sjónarmiði. Tað er ætlanin at hann ikki einans skal leggja dent á boringar hjá Amerada Hess, men heldur at tosa breitt um fyrstu boringarnar í Føroyum.

Amerada Hess er sjálv tann triðja fyritøkan, sum ger royndarboringar í Føroyum. Frammanundan hava bæði Statoil og BP verið í føroyskum sjógvi og gjørt royndarboringar. Higartil er ikki nakað serliga gott úrslit spurt burturúr. Fyritøkurnar eins og myndugleikarnir hava tó als ikki mist mótið enn.

Hin fyrilestrarhaldarin á fundinum í kvøld verður sum áður nevnt Magni Arge. Stjórin fyri størstu og einastu flutningsfyritøkuna av sínum slag í Føroyum hevur fingið til uppgáva at lýsa eitt sindur nærri fyrstu oljuboringarnar á føroyska landgrunninum, sæð frá einum føroyskum veitara sjónarmiði.

Tað er í sambandi við, at Atlantic Airways hevur verið virkið í royndarboringinum í sambandi við flúgving. Tað eru tyrlur, sum flúgva bæði við ferðafólki og virka sum hjálpartyrlur í neyðstøðum.

Fundurin í kvøld byrjar kl. 19.00 í Listaskálanum.

# Flogførini eru amerikonsk

**Í gjár stóð skrivað í Sosialinum, at NATO flogfør høvdu frítt at fara í føroyskum loftrúmi. Rætta orðingin var heldur, at amerikonsk hernaðarflogfør høvdu fingið frítt at fara í føroyskum loftrúmi**

RÆTTING
*Heri á Rógvi*

Tað var í Sosialinum í gjár, at tað stóð skrivað, at NATO flogfør høvdu fingið frítt at fara í føroyskum loftrúmi. Skrivað varð eisini, at hesir upplýsingar vóru fingnir frá Vibeke Larsen, ríkisumboð. Sosialurin vendi sær eisini til Vibeke Larsen, sum upplýsti um støðuna, men tíanverri er ein misskiljing komin fyri, soleiðis at yvirskriftin í greinini ikki heilt kann sigast at passa.
Tað er nemliga soleiðis, at tað er »US Military Aircrafts« ella amerikonsk hernaðarflogfør, sum hava fingið loyvi at nýta føroyskt loftrúm í eitt ár, t.e. general diplomatic clearence. Umbønin er komin gjøgnum NATO, men er bert fyri »US Military Aircrafts«.

Hetta merkir, at tað eru ikki øll limalond innanfyri NATO, sum kunnu senda síni flogfør treytaleyst gjøgnum føroyskt loftrúm næsta árið, men bert amerikanskir hernaðarflúgvarar. Frammanundan er onkur seravtala gjørd fyri nøkur flogfør, men hetta eru heldur flogfør, sum eitt nú flúgva óvanliga høgt uppi. Tì kann tað sigast, at føroyingar stuðla amerikumonnum. Í tí sambandi, at vit eru umvegis limir í NATO, og umsóknin kom frá NATO, so er yvirskriftin kanska heldur ikki langt av leið. Vit kunnu bert umbera mistakið fyri øllum pørtum og lesarunum.




Fyrstur við tí seinasta
5 ferðir um vikuna


Sosialurin
Nr. 96 • týsdagur • 22. mai 2001 • 75. árgangur • Kr. 10,00
Dansurin gekk so lystiliga í Havn
síða 4
www.sosialurin.fo
Arbeiðsleysur:
Jákup er liðugur í Herfølge
Ítróttur, s. 13–28

Ja!
Sjálvandi vil eg halda Sosialin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr.: ____________

Bygd/býur: ____________

Undirskrift: ____________

Ókeypis
Verður sent óposta\u00f0 Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn